

# Fyrsti partur er útlutaður

**Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, hevur gjørt av at lýsa kunngerð, sum skipar fiskiskapin eftir fyrsta partinum av føroysku makrelkvotuni fyri 2011**

Vilmund Jacobsen

Fyrstu makrelloyvini verða útskrivað ein av komandi døgunum.

Kunngerðin fevnir um tey 35.000 tonsini av føroysku makrelkvotuni fyri 2011, sum politisk semja er um at útluta nótaskipum uttan avgjald.

Tað skrivar Føroya Skipara-og Navigatørfelag á síni heimasíðu.

- Kvota er einki sett av at nýta til vísindaligar royndir eftir makreli. Politiska viðgerðin av býtinum av teimum írestaðu 83.200 tonsunum er líðug.

Felagið vísir á, at 63.200 tons av hesum verða lutað út móti gjaldi. Av hesum verða 25.000 tons lutað nótaskipum.

38.200 tons verða lutað út til onnur skip enn nótaskip, sum ein felagskvota við hámarki, soleiðis at ávís spjaðing verður millum vinnuluttakarar, eins og at møguleiki verður fyri fjølbroyttum fiskiskapi.

20.000 tons verða boðin út á marknaði.

- Arbeiðið at fyrireika skipanir fyri útluting av restini av makrelkvotuni við avgjaldi og sølu er longu komið væl áleiðis og verður væntandi klárt til politiska viðgerð í hesi vikuni.

Føroya Skipara-og Navigatørfelag vísir til tað, sum løgmaður hevur sagt og skrivar, at miðað verður eftir skjótari viðgerð, soleiðis at eisini aðrir skipabólkar sleppa til makrelfiskiskap sum skjótast.

# Undanbrekku



Ósemja í Tjóðveldi um stýrisskipanina

## Í MORGIN

7/9°C




Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.

## SUNNUDAGIN

5/8 °C




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur. Sirm ella mjørki og hitin millum 9 og 12 stig.

## MÁNADAGIN

5/8 °C




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regna v og á. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1029 hPa. við Jan Mayen stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 992 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga í útnyrðing norðan og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Føroyar fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar um vikuskifti.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 29. apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 3. mai | Tendring |
| 10. mai | Fyrra kvarter |
| 15. mai | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. mai | 09:38 | 22:02 | 08:38 | 21:02 | 08:53 | 21:17 | 11:38 | - | 00:15 | 12:38 | 07:53 | 20:17 |
| 7. mai | 10:26 | 22:50 | 09:26 | 21:50 | 09:41 | 22:05 | 00:02 | 12:26 | 01:02 | 13:26 | 08:41 | 21:05 |
| 8. mai | 11:14 | 23:38 | 10:14 | 22:38 | 10:29 | 22:53 | 00:50 | 13:14 | 01:50 | 14:14 | 09:29 | 21:53 |
| 9. mai | - | 12:01 | 11:01 | 23:24 | 11:16 | 23:39 | 01:38 | 14:01 | 02:38 | 15:01 | 10:16 | 22:39 |
| 10. mai | 00:24 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:24 | 15:01 | 03:24 | 16:01 | 11:16 | 23:53 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. mai | 06:53 | 19:17 | 09:53 | 22:17 | 10:53 | 23:17 | 09:23 | 21:47 | 10:38 | 23:02 |
| 7. mai | 07:41 | 20:05 | 10:41 | 23:05 | 11:41 | - | 10:11 | 22:35 | 11:26 | 23:50 |
| 8. mai | 08:29 | 20:53 | 11:29 | 23:53 | 00:05 | 12:29 | 10:59 | 23:23 | - | 12:14 |
| 9. mai | 09:16 | 21:39 | - | 12:16 | 00:53 | 13:16 | 11:46 | - | 00:38 | 13:01 |
| 10. mai | 10:16 | 22:53 | 00:39 | 13:16 | 01:39 | 14:16 | 00:09 | 12:46 | 01:24 | 14:01 |